



## GAMLARÆTT

*Tað er ikki bert í Kirkjubø at tey hava eina gamla rætt. Her í Kunoy er eisini ein gomul rætt, sum hevur verið í brúki inntil nú. Henda rættin, sum sigst stava heilt afturi frá miðøldini, verður í summar avloyst av eini nýggjari og størri*



## RUDDILIGT

*Var tað ikki fyri óruddið í hesi ánni í Kunoy, hevði myndin verið fullkomin. Tað átti at verið so lætt at fingið alt tað, sum ikki eigur at vera í eini á, beint burtur. Tað hevði verið tað ruddiligasta*



## VEÐRAR

*Menn í Kunoy hava stóran áhuga í seyðahaldi. Her eru tveir teirra komnir á ta gomlu rættina norðarlaga í bygdini, har nakrir veðrir verða sleptir*



## SÚKKLA

*Seinnapartin mikudagin var av besta veðri í Hvannasundi. Eftir loknan skúladag var bara eitt at gera: Út við súkkluni*

## SUMMARSÓL

*Ein vøkur kvøldarmynd, tikin suður úr byrgingini um Hvannasund. Fyrr um dagin hevði veðrið verið lítið hugaligt, men út á seinnapartin blíðkaði hann veðrið. - So vakurt kann tað altso vera í Hvannasundi*